betri trygging

# Viðgerðartrygging

## Privat



Tín prísur
**2.956,-**

# **Viðgerðartrygging** · Privat

## Snarvegur til skjóta viðgerð

Hjá Betri Trygging eru vit sannførd um, at gerandistryggleiki ikki bara snýr seg um at sleppa undan sjúku og skaða. Tað snýr seg minst líka nógv um at vita, at tú fært skjóta viðgerð, um sjúka ella skaði raka.

Betri Viðgerðartrygging er snarvegurin til skjóta kanning og viðgerð, tá tú hevur brúk fyri tí.

Í hesum faldara greiða vit tær frá Betri Viðgerðartrygging, og hvussu tú lætt og einfalt teknar hesa tryggingina.

### Skjót atgongd til serlækna

Skjót kanning og viðgerð er fyrsta stig á vegnum at koma aftur til ein virknan gerandisdag.

Við Betri Viðgerðartrygging veita vit vissu fyri, at tað gongur skjótt. Í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at skaðafráboðanin er góðkend, hevur tú verið til fyrstu kanningina ella viðgerðina hjá einum serlækna í okkara viðgerðarskipan. Hon fevnir um góðskugóðkend privatsjúkrahús og privatar heilsustovur í Føroyum og í Danmark.

### Góður dekningur

Betri Viðgerðartrygging fevnir um skaðar og sjúkur, sum henda, eftir at tú hevur teknað tryggingina, og sum krevja kanning og viðgerð hjá serlækna ella serkønum viðgera.

Eftir seks mánaðir dekkar tryggingin eisini skaðar og sjúkur, sum hendu, áðrenn tú teknaði tryggingina – og viðgerðin er tá altíð eftir galdandi tryggingartreytum.

Hevur tú havt viðgerðartrygging hjá okkum ella í øðrum felag, áðrenn tú teknaði Betri Heilsutrygging, rokna vit teg sum tryggjaðan frá tí, at fyrra tryggingin tók við. Omanfyrinevndu seks mánaðir verða sostatt taldir frá fyrsta tekningardegnum. Tað má tó ikki vera steðgur ímillum báðar tryggingarnar, um henda reglan skal galda.

### Fleiri fyrimunir

Tá ið tú teknar Betri Viðgerðartrygging, er onki krav um heilsuupplýsingar – øll eru á jøvnum føti.

Samstundis er heilsufakligi serkunnleikin altíð tøkur, eftirsum allar fráboðanir verða viðgjørdar av royndum, heilsufakligum skaðaviðgerum á Gjensidige.

Tú kanst eisini søkja um viðgerð fyri rúsdrekka-, rúsevnis- og medisinmisbrúk. Tá fráboðan tín er góðkend, gevur Betri Viðgerðartrygging atgongd til kanning og viðgerð hjá m.a.:

- Serlækna
- Psykiatara
- Zoneterapeuti
- Massøri
- Kiropraktori
- Ergoterapeuti
- Fysioterapeuti
- Akupunktøri
- Fótarøktara
- Dietisti
- Sálarfrøðingi

### Soleiðis teknar tú teg

Tú teknar teg til Betri Viðgerðartrygging við at fylla tilmeldingarblaðið á síðstu síðu út og senda okkum tað.

**Tín prísur:** **kr. 2.956,- um árið**

Tú kanst tekna Betri Viðgerðartrygging til tú fyllir 60 ár. Eftir tað kanst tú einans endurtekna tryggingina.

### Minst eisini til at tryggja familjuna

Betri Viðgerðartrygging er eisini til hjúnafelagan/samlivan og børn tykkara. Eru bæði tú og hjúnafelagin/samlivin fevnd af Betri Viðgerðartrygging, ja, so eru børn tykkara undir 24 ár sjálvvirkandi eisini fevnd av Viðgerðartryggingini – børnini skulu búgva í Danmark, Føroyum ella Grønlandi.

**Prísur fyri hjúnafelagan/samlivan:** **kr. 2.956,- um árið**

Tú kanst eisini tekna eina barnatrygging fyri børn tíni undir 24 ár. Hon kostar 775 kr. árliga pr. barn (tøl fyri 2026).

Gev gætur, at skaðar og sjúkur altíð verða dekkað sambært galdandi tryggingartreytum.

### Tilval – flutningur til viðgerðarstað

Tað er ein fyrimunur eisini at tekna flutningstilval til hjúnafelagan/samlivan og børnini. Tá fáa tit ferðaútreiðslurnar afturgoldnar í samband við góðkenda viðgerð ella útgreinan á einum viðgerðarstaði í Danmark (aftur og fram).

Ynskir tú at tekna ein flutningstilval fyri hjúnafelagan/samlivan og børnini, er prísurin pr. persón einans 1.035 kr. árliga (tøl fyri 2026).

Set kross í rútin á tilmeldingarblaðnum, um tú ynskir at tekna flutningstilval.

**Viðgerðartrygging** · Privat

## So lættliga fært tú hjálp

### – Um sjúka rakar ella tú fært skaða

Hevur tú tørv á kanning ella viðgerð, er hjálpin altíð nær.

Tryggingin verður teknað hjá Betri Trygging, men verður umsitin av Gjensidige, og tí boðar tú frá skaða beinleiðis hjá Gjensidige. Á "Min side", sum tú finnur á gjensidige.dk, fyllir tú lætt og skjótt skaðafráboðanina út.

Hevur tú tørv á ráðgeving, sita fólk á Gjensidige eisini klár at hjálpa tær. Áðrenn tú sendir skaðafráboðan, skalt tú í flestu førum biðja egnan lækna um at ávísa viðgerðina.

Á heimasíðuni hjá Gjensidige kanst tú lesa meira um, hvat slag av viðgerðum krevja læknaávising.

**Hevur tú spurningar, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við Gjensidige á tel. +45 7010 9009.**
Tey taka sær av allari viðgerð fyri Betri Trygging.

Faktablað um hesa trygging finnur tú her.

Fleiri upplýsingar um tryggingina finnur tú í tryggingar-treytunum.

1. Bið egnan lækna geva tær ávísing til viðgerðina fyri skaðan, sjúkuna ella pínuna.
2. Fyll skaðafráboðanina út á "Min side" á heimasíðuni hjá gjensidige.dk
3. Tú frættir aftur innan 1-2 yrkadagar - og svarið finnur tú á "Min side"

betri trygging

# Tilmelding

## Oplysninger om forsikringstager

| | |
|---|---|
| For- og efternavn: | |
| P-tal: | Tlf. nr.: |
| E-mail | |
| Gade/vej: | |
| Postnr.: | By: |
| Ønsker du at tegne transportdækning? (1.035 kr. pr. år) (sæt kryds) ☐ | |

## Tilmelding af dine børn under 24 år*

| | |
|---|---|
| For- og efternavn: | P-tal |
| For- og efternavn: | P-tal |
| For- og efternavn: | P-tal |
| Ønsker du at tegne transportdækning for dine børn? (1.035 kr. pr. barn pr. år) (sæt kryds) ☐ | |

## Tilmelding af ægtefælle/samlever

| | |
|---|---|
| For- og efternavn: | |
| P-tal: | Tlf. nr.: |
| E-mail | |
| Gade/vej: | |
| Postnr.: | By: |
| Ønsker du at tegne transportdækning for ægtefælle/samlever? (1.035 kr. pr. år) (sæt kryds) ☐ | |

*Når du har udfyldt blanketten, beder vi dig underskrive, indscanne og sende den til os via dette link:*
***https://sundhed-kontakt.gjensidige.dk/***
*Du vælger "**Mig som kunde**" og angiver "**Andet**" som årsag til kontakt.*
*Husk at tilføje din mailadresse, da vi ikke kan tilmelde dig uden.*
*NB: Tilmelding sker pr. førstkommende 1. i måneden, efter Gjensidige har registreret din blanket.*

**Udfyld meget gerne informationerne på dine børn. På den måde kan vi hurtigt identificere dem, hvis de skal have hjælp via forsikringen. Vores kunderådgivere registrerer, om børnene bliver gratis medforsikret, eller om der skal opkræves betaling, hvilket afhænger af, om tilmelding af ægtefælle/samlever er udfyldt.*

## P-tal samtykke

Jeg giver hermed samtykke til, at Gjensidige må behandle mit P-tal til brug for entydig identifikation af mig. Du kan når som helst tilbagekalde dit samtykke på Min side eller ved at kontakte Gjensidige Forsikring. Se hvordan i vores privatlivspolitik, som du finder på gjensidige.dk, hvor du også kan læse mere om vores behandling af personoplysninger.

Jeg giver mit P-tal-samtykke (sæt kryds): ☐

## Mere information

Vi har brug for dit samtykke til "Behandling af mit P-tal" for at kunne forsikre netop dig. Svarer du "Ja", er vi sikre på, at du er den rigtige person, vi forsikrer.

## Gjensidige

Med Gjensidige mener vi Gjensidige Forsikring, dansk filial af Gjensidige Forsikring ASA Norge herunder Gjensidige-ejede brands som Gouda Rejseforsikring og Dansk Tandforsikring.

## Underskrift

Dato: ______________________ Underskrift: ______________________

Dato: ______________________ Ægtefælle/samlever (hvis han/hun tilmeldes): ______________________